UTTAN ÚR HEIMI

# USA hevði fleiri møguleikar at beina fyri bin Laden

**Hoyringin í amerikanska Senatinum um tað, sum hendi fyri tann 11. september í 2001, hevur avdúkað, at bæði Clinton-stjórnin og Bush-stjórnin høvdu fleiri møguleikar at taka Osama bin Laden**

HOYRING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Bæði stjórnin hjá Bill Clinton og stjórnin hjá George W. Bush høvdu upplýsingar um, hvar Osama bin Laden var staddur og kundu havt beint fyri honum. Tað er kortini ivasamt, um tað hevði forðað atsóknini at World Trade Center og Pentagon tann 11. september í 2001*

Hesa vikuna hevur ein serlig nevnd hjá amerikanska Senatinum avhoyrt fleiri leiðandi stjórnarlimir og embætismenn hjá Bill Clinton og George W. Bush fyri at fáa staðfest, hvat myndugleikarnir vistu undan atsóknini tann 11. september í 2001, og hvat kundi verið gjørt fyri at forða atsóknini.

Hoyringin avdúkaði, at samskiftið í stjórnarumsitingunum var vánaligt, og at politikararnir mistóku seg, meðan Osama bin Laden og hansara menn fyrireikaðu seg. Fyrrverandi yvirgangsráðgevin hjá Clinton og Bush, Richard A. Clarke, segði undir hoyringini, at tað var trupult at fáa teir ovastu leiðararnar í Bush-umsitingini at góðtaka álvaran í hóttanunum frá al-Qaeda.

Niðurstøðan aftan á hoyringina er millum annað:

* Undir Bill Clinton helt CIA seg ikki hava heimild til at beina fyri bin Laden, uttan so at hann doyði í einari roynd hjá CIA at taka hann. Men fregnartænastan spurdi seg ongantíð fyri hjá politikarunum um heimildina. Politikararnir visti ikki betur, enn at Clinton hevði givið CIA ta neyðugu heimildina.

* Í tíðarskeiðinum ímillum atsóknirnar at amerikonsku sendistovunum í Kenya og Tanzania í 1998 og atsóknina 11. september í 2001 boðaðu afghanskir agentar seks ferðir CIA frá, hvar bin Laden var staddur, men eingin roynd varð gjørd at beina fyri honum.

* Bæði í stjórnini hjá Clinton og stjórnini hjá Bush vóru menn samdir um, at fregnartænastuupplýsingarnar um, hvar bin Laden var staddur, vóru ikki nóg neyvar, til at tað var ráðiligt at geva boð um eitt rakettálop á hann. Í trimum førum ætlaði Clinton-stjórnin at leypa á, men gjørdi tað ikki, tí menn bóru ótta fyri, at álopið fór at krevja ov mong ósek mannalív.

* Í báðum stjórnunum var semja um, at tað var ikki politiskt ráðiligt at leypa á Afghanistan, tí hvørki Kongressin ella tað amerikanska fólkið hevði tikið undir við tí.

* Tá Bush-stjórnin tók við, høvdu menn lítlan hug at halda somu kós, sum Clinton-stjórnin hevði nýtt. Ístaðin fyri at arbeiða víðari við ætlanunum hjá undanfarnu stjórnini valdi Bush-stjórnin at leggja sínar egnu ætlanir, hvørs endamál var at beina fyri bin Laden og felagsskapinum al-Qaeda. Hesar ætlanirnar, sum skuldu fremjast eftir trimum árum, lógu klárar tann 10. september í 2001, dagin fyri atsóknina.

* Í 2001 vistu nakrir persónar í samveldisløgregluni FBI, at tveir limir í al-Qaeda gingu á einum flogskúla í USA. Upplýsingarnar vórðu sendar leiðsluni í CIA. Tann 11. september í 2001 vóru teir báðir flognæmingarnir við í atsóknini.

* Í juni og juli í 2001 boðaðu fregnartænasturnar frá fleiri upplýsingum um ætlað álop á amerikonsk mál. Hildið varð, at menn fóru at søkja at amerikonskum málum uttanlands, og á meiri enn 30 støðum vórðu verjutiltøk sett í verk.

Samanumtikið vóru teir avhoyrdu politikararnbir og embætismenninir á einum máli um, at hvørki stjórnin hjá Bill Clinton ella stjórnin hjá George W. Bush kundu havt forða atsóknini at World Trade Center og Pentagon, sjálvt um tað skuldi havt eydnast at beina fyri Osama bin Laden.

# Meiri eftirlit í Evropa

**Ætlanin at stovna eitt evropeiskt CIA verður ikki sett í verk, men myndugleikarnir fara at savna fleiri upplýsingar um borgararnar í Evropa**

EVROPA OG YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sum lið í bardaganum ímóti yvirgangi hava leiðararnir í ES samtykt at savna fleiri upplýsingar um borgararnar. Eitt nú skulu myndugleikarnir hava fleiri upplýsingar um passið hjá tí einstaka, flogferðir, telefonsamrøður, hvussu fólk nýta alnótina, og hvat tey nýta hana til.

Evropa verður eitt eftirlitssamfelag, siga tey, sum halda tiltøkini vera ov víðgongd, men leiðararnir í ES-londunum siga tey vera neyðug í bardaganum ímóti yvirgangi. Og tiltøkini verða fleiri.

Umframt eftirlitið við tí einstaka borgaranum skulu myndugleikarnir savna og samskipa allar upplýsingar um yvirgangsmenn og yvirgangsatsóknir í Evropa. Teir skulu eisini samskipa upplýsingar um ymisk spreingievni og mannagongdina hjá yvirgangsmonnum. Alt skal savnast á einum staði.

Passini, sum í dag verða nýtt í Evropa, skulu skiftast út. Í seinasta lagi í juni næsta ár kemur eitt nýtt pass. Tað skal hava tær vanligu upplýsingarnar um eigaran, men harafturat skal fingramerkið hjá eigaranum setast í passið.

Samstundis er avgjørt, at í framtíðini skulu flogfeløgini goyma upplýsingar um, hvør hevur ferðast við flogførunum, og tað sama verður galdandi fyri telefonfeløg og alnótaútbjóðarar. Í Danmark hevur stjórnin longu skotið upp, at allur teldupostur skal goymast minst tríggjar mánaðir.

### Yvirgangsovasti

Á toppfundinum í Bruxelles fyrradagin samdust leiðararnir um at gera álvara av tosinum um at samskipa tann evropeiska bardagan ímóti yvirgangi. Upprunaliga varð ein slík ætlan samtykt í september í fjør, men atsóknin í Madrid tann 11. mars hevur skumpað undir londini.

Samstundis hevur ES fingið ein yvirgangsovasta. Tað er niðurlendingurin Gijs de Vries. Hann skal samskipa bardagan ímóti yvirgangi og tryggja, at tey einstøku londini halda tær nýggju eftirlitsreglurnar. Hann skal eisini hava tað regluliga samskiftið við amerikonsku myndugleikarnar um yvirgang.

ítróttur

Nr. 61 • fríggjadagur • 27. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Gyltar klaksvíkskvinnur

**Leygardagin hevur Bára Skaale Klakstein saman við Unu Olsen møguleika at vinna sítt fimta gullmerki**

GULLDYSTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Bára S. Klakstein og Una Olsen hava báðar longu vunnið fýra gullheiðursmerkir hetta seinasta árið. Leygardagin hava tær møguleika at ogna sær fimta gullið til savnið*

Leygardagurin er eingin vanligur føroyskur hondbóltsdagur. Hetta er nevnliga dagurin, tá tað eftir sólarmerkjum at døma verður gjørt av, hvørt tað verða VB ella Stjørnan, sum komandi árið kunnu breggja sær av vera føroyameistarar í kvinnuhondbólti.

Og hjá tveimum av leikarunum hjá Stjørnuni er hetta so eisini dagurin, har tær kunnu ogna sær sítt fimta gullmerki á árinum.

### Gull, gull og meira gull

Bára S. Klakstein og Una Olsen hava nevnliga báðar tvær longu verið partur av fýra gullheiðursmerkjum í ár. Í fótbóltinum hava tær saman við KÍ vunnið tað, sum er vert at vinna, og á Oyggjaleikunum seinasta summar gjørdist tað til gull við kvinnulandsliðnum.

Harumframt hava tær sum kunnugt eisini fingið eitt gullmerki í hondbóltskappingini higartil, og so er spurningurin, hvørt gyltað ársskeiðið eisini kann enda við einum gulli, ella um tær hesaferð mugu lata sær lynda við silvurmerkjunum.

Og tá vit hóskvøldið hittu Báru á orði, duldi hon ikki fyri, at tað var við stórum spenningi, at hon og liðfelagarnir nú fyrireika seg til at fara til Vágs.

– Sjálvandi eru vit spentar. Øgiliga spentar. Fólk her í býnum hava eisini tosað um dystin alla vikuna. Ung sum gomul tykjast øll hugsa um hondbóltin, og so sanniliga eisini fólk, sum eg ikki hevði ánilsi av høvdu áhuga fyri hondbólti. Tú merkir veruliga, at hetta er nakað heilt stórt, og at KÍ so samstundis er í ferð við at gerast 100 ár, og at hetta soleiðis kundi verið eitt gott startskot, ger sjálvandi ikki spenningin minni, sigur hon.

### Hugsa frameftir

Størsti parturin av hópinum hjá Stjørnuni fer til Vágs fríggjakvøldið, men hóast tíðin fram til dystin so skal nýtast til fyrireiking, so dugir Bára ikki so væl at siga nakað ítøkiligt um, júst hvørjar fyrireikingar verða nýttar til hendan dystin.

– Fyrst og fremst, so royna vit at hugsa um okkara spæl. Sjálvandi er venjingin fram til dystin eitt sindur merkt av, at tað er VB, sum nú er mótstøðuliðið, men fokus hjá okkum má alla tíðina vera á okkum sjálvar.

Men tit hava jú spælt nakrar dystir móti VB í ár. Síðani jól hava tit tapt greitt í landskappingini og síðani vunnið í steypakappingini. Er ikki nakað úr teimum dystunum, sum tit kunnu nýta?

– Eg veit ikki rættiliga, hvussu nógva orku vit vilja brúka til hasar dystirnar. Teir eru farnir, og hjá okkum ræður um at líta frameftir. Dysturin, sum telur, er tann leygardagin, og tað fyrihalda vit okkum til, er hon skjót at svara.

– Men hinvegin eru sjálvandi ávísir lutir, sum vit kunnu nýta úr teimum dystunum. Fyrst og fremst, so ræður um at fáa verjuna at rigga. Gera vit tað, so fáa vit eisini gongd á kontraspælið, og so hava vit góðan møguleika at vinna dystin, sigur Bára.

### Nervar skulu til

Og aftur móti endanum av samrøðuni nevnir Bára spenningin, sum er til dystin. Ein spenningur, sum kanska er eyka stórur hjá henni í mun til fleiri aðrar á liðnum, tí hon var ikki partur av gull-liðnum frá 2000. Hetta tí hon tá nam sær útbúgving.

– Í nógvar mátar er tað sami spenningur, sum hjá einum teenagara. Tá eg hugsi um dystin, so eru summarfuglar í búkinum, og eg ivist ikki í, at karmarnir til ein veruligan stórdyst vera optimalir.

– Í Vági er í øllum førum altíð fult av fólki, og sum eg havi skilt tað, so tosa fleiri í Klaksvík eisini um at fara suður, og tað gevur so bara enn fleiri fólk í høllini.

– Hjá okkum ræður so bara um at tveita nervarnar burtur. Sjálvandi skalt tú vera spent, men ikki nógv. Megna vit tað, so ivist eg ikki í, at tað verður ein fínur dystur, og hann verður enn betri, um vit so eisini vinna, sigur Bára S. Klakstein at enda.

# Christian er nú avbjóðarin

**Hóskvøldið varð bræv latið FSF-skrivstovuni, har fimm feløg skjóta Christian Andreasen upp sum formansevni hjá FSF**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

So tykist endaliga greitt, at føroysku fótbóltsfeløgini fáa tað, sum tey vilja hava.

Til komandi aðalfundin, sum framvegis er framhald av upprunaliga fundinum, eru nú tvey valevni at velja ímillum, tá krossurin skal setast fyri, hvør skal vera oddamaðurin fyri føroyskum fótbólti tey bæði næstu árini.

Í blaðnum fyrradagin skrivaðu vit, at tað var upp á tal, at Christian Andreasen varð settur í uppskot, og mikukvøldið kom so bræv frá fimm feløgum, har sagt verður, at tey hava skotið sakføraran upp til formansvalið.

Tey fimm feløgini eru B71, B36, NSÍ, SÍ og KÍ, og við einum somikið breiðum baklandi er lítið at ivast í, at vónirnar um at fáa formannin hjá hesum feløgum so avgjørt er til staðar.

Umframt hesi tykist lítil ivi vera um, at í fleiri onnur standa til reiðar at taka undir við Christiani Andreasen, og so er spurningurin, hvørt hesi eru nóg mikið til at koma upp um 11, sum gevur meirilutan, ella um mótvalevnið, Óli Holm, hevur somikið dyggan stuðul, at hann kortini kann halda meirilutanum.

Tann spurningurin verður so ikki svaraður fyrr enn um eina viku, tá aðalfundurin stendur á skránni, og sum støðan er í løtuni, so fáa feløgini júst tað, sum tey vilja hava. Eitt val millum tveir kandidatar.